## Brian Kerr:
# Hansen stendur seg væl



Helgi L. Petersen, fótbóltsviðmerkjari, vísti í farnu viku á, at Símin Hansen stendur einki aftan fyri fleiri av føroysku landsliðsleikarunum.

Brian Kerr, landsliðsvenjari, sigur við Sosialin, at hann veit væl, at sandoyingurin hevur staðið seg sera væl í hesum kappingarárinum.

– Eg veit, at hann hevur verið eyðsýndur í fleiri dystum. Landsliðshópurin verður úttikin skjótt, og eg vísi ikki aftur, at Símin Hansen verður í hópinum. Eg hugsi um hann sum ein møguleika til landsliðshópin, sigur Brian Kerr, landsliðsvenjari.

*uni@sosialurin.fo*



*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Lítið at frætta um Klettskarð

**FÓTBÓLTUR** Tað er framvegis ikki greitt, um KÍ fær pengarnar fyri Páll Klettskarð, sum klaksvíkingar krevja

**Uni Holm Johannesen**

Tað er ikki víst, at KÍ fær pengar fyri Páll Klettskarð.

Kringvarpið boðaði í farna mánaða frá, at KÍ vil hava gott og væl 25.000 krónur frá Víkingi fyri Páll Klettskarð.

Lógirnar siga, at føroysk feløg hava rætt at krevja pengar fyri leikarar, sum eru uppvaksnir í felagnum og eru undir 21 ár.

KÍ vil gera sær dælt av hesum og krevur pengar frá Víkingi, sum Klettskarð umboðar í løtuni.

– Tað er lítið at frætta í málinum. Vit vita satt at siga ikki, hvør avgerðin verður. Tað er orsakað av, at KÍ flutti niður, og hann hevur spælt í Danmark. Málið er til viðgerar hjá FSF, og vit bíða eftir avgerðini, sigur Tummas Lervig, formaður í KÍ.

# Stankovic spælir ikki aftur í ár



*Nenad Stankovic ikki við Víkingi aftur í ár*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**FÓTBÓLTUR** Nenad Stankovic verður ikki aftur á fótbóltsvøllinum í hesum kappingarárinum

**Uni Holm Johannesen**

Tað sigur Jógvan Martin Olsen, venjari hjá Víkingi.

Serbiski miðvallarin noyddist av vøllinum við skaða óstbeininum í landskappingardystinum móti HB sunnudagin. Hann meiddi seg í nærdysti við Fróða Benjaminsen.

Tað er framvegis ikki endaliga staðfest, hvussu álvarssamur skaðin er, men Jógvan Martin Olsen sigur, at alt bendir á, at Stankovic verður ikki tøkur aftur í ár.

Víkingur hevur mist fleiri av stuðulsleikarunum í hesum kappingarárinum. Súni Olsen hevur sitið uttan fyri við skaða síðan í gott og væl fýra mánaðir, Atli Gregersen skifti til skotska Ross County í summarsteðginum, Hans Jørgen Djurhuus hevur spælt fáar dystir, orsakað av skaða, Andreas Lava Olsen ætlaði sær at hjálpa í summarsteðginum, men hann spældi ikki fleiri enn 20 minuttir, tí hann var skaddur – og nú er greitt, at Nenad Stankovic fer ikki at spæla aftur í hesum kappingarárinum.

*uni@sosialurin.fo*

# Arsenal vann á Tottenham

**CARLING-CUP** Arsenal vann í kvøld 4-1 á Tottenham í Carling Cup, men hóast støðan ljóðar av nógvum, so mátti eykatíð til, áðrenn Arsenal dreingirnir avgjørdu dystin

**Tróndur Arge**

3. umfar av Carling Cup er hetta vikuskiftið og á White Hart Lane í London, tók Tottenham ímóti grannunum úr Arsenal. Bæði liðini lótu fleiri ungar leikarar fáa møguleikan frá byrjan. Tað kom Arsenal nógv best frá í fyrra hálvleiki. Arsenal hevði fult tamarhald á dystinum og hevði bóltin fyri tað mesta. Longu eftir eitt korter legði Henri Lansbury Arsenal á odda.

Í seinna hálvleiki skifti Tottenham Robbie Keane og Aron Lennon inn og tað hjálpti. Robbie Keane hevði bara verið á vøllinum í fýra minuttir, tá hann javnaði fyri Tottenham. Tað var eisini úrslitið eftir 90.min og so var fari til eykatíð.

Longu aftaná seks minuttir av eykatíðini, hevði dómarin tvær ferðir brísklað fyri brotssparkið til Arsenal. Í báðum førum umsetti Samir Nasri til mál. Løtu seinni økti Andrei Arshavin til endaliga úrslitið 4-1.

Arsenal hevur seinni árini nýtt Carling Cup til at lata teir ungu sleppa framat. Tað hevur mangan gingið teimum væl og harfrá kemur heitið, »Arsenal kids«.

**Carling Cup:**

| | |
|---|---|
| Tottenham – Arsenal | 1-4 (eykatíð) |
| Birmingham – MKD | 3-1 |
| Brentford – Everton | 1-1 (5-4, br) |
| Burnley – Bolton | 1-0 |
| Millwall – Ipswich | 1-2 |
| Peterbrough – Swansea | 1-3 |
| Portsmouth – Leichester | 1-2 |
| Stoke – Fulham | 2-0 |
| Sunderland – West Ham | 1-2 |
| Wolverhampton – Notts County | 4-2 |

*trondur@sosialurin.fo*